

# Grundrakstur landskassans 1350 milliónir skeivan veg

**LANDSKASSIN** Landsbankin staðfestir í seinastu frágreiðing síni, at stak illa hevur gingist hjá landinum at tálma útreiðslunum seinastu 10 árini. Inntøkurnar vuksu góðar 600 milliónir krónur og útreiðslurnar 2000 milliónir krónur. Nú má politiska skipanin taka annað skinn um bak, tí annars verður trupult at gjalda skuld og finna pening til íløgur, sigur landsbankin

Uni Arge

Alt sá bjart út í 2000, og á grundrakstrinum hjá landskassanum var avlopið 767 milliónir krónur. Í dag er vent í holuni. Á fíggjarlógini fyri 2010 verður roknað við einum halli á 581 milliónir krónur. Grundrakstur landskassans er sostatt versnaður við umleið 1350 milliónum krónum seinastu 10 árini.

So greitt setir Landsbanki Føroya fíggjarstøðu landsins upp í seinastu frágreiðing síni, ið ivaleyst er latin úr hondum júst nú, tí fíggjarlógarviðgerðin stendur fyri durum. Politikararnir hava við frágreiðingini fingið eitt skilligt skjal at lesa burturúr. Fara útreiðslurnar til himmals, fer landsins fíggjarliga minus sama veg, fáa teir at vita frá landsbankanum.

Hugtakið grundrakstur í frágreiðingini fevnir um vanligar úreiðslur og inntøkur hjá landskassanum og ikki um rentur, íløgur, einskiljingarinntøkur og aðrar kapitalinntøkur. Júst hetta ger frágreiðingina áhugaverda, tí á rakstrartølunum sæst nágreiniliga, um rakstturin hongur saman, og tað ger hann ikki.

### Útreiðslur til stroks

Í politiska orðaskiftinum hevur mangan verið trivið í blokkniðurskurðin sum orsøk til alla fíggjarliga afturgongd hjá tí almenna, men tann pástandurin er ógvusliga yvirdrivin.

Landsbankin skrivar, at lækkingin av heildarveitingini er størsta einstaka grundin til versnaða rakstrarúrslitið, men meðan blokkurin lækkaði 366 milliónir krónur, eru aðrar rakstrarinntøkur seinastu 10 árini vaksnar við 1000 milliónum krónum, so á inntøkusíðuni hevur vøksturin verið góðar 600 milliónir krónur.

Landsbankin staðfestir:

»Høvuðsorsøkin til, at rakstrarúrslit landskassans er umleið 1350 milliónir krónur verri í 2010 enn tíggju ár frammanundan, er at finna á útreiðslusíðuni. Løgting og landsstýri tykjast hava trupulleikar í sambandi við stýring av útreiðslum landskassans. Árini 2000 til 2010 eru bruttoútreiðslurnar øktar við meiri enn 2000 milliónum krónum.«

Vøksturin av útreiðslum til lønir, tilfar og veitingar var í meðal 3,4 prosent árliga, verður sagt í frágreiðingini. Hesin vøkstur er fleiri ferðir størri enn samsvarandi vøksturin hjá danska ríkiskassanum. Landsbankin mælir tí til, at yvirlit yvir grundrakstsurin hjá landskassanum í framtíðini verður kunngjørt sum partur av uppskotunum um fíggjarkarm og fíggjarlóg.

Landsbankin ber eisini løgtingi og landsstýri hesi greiðu boð, nú farið verður undir at viðgera fíggjarlógina fyri 2011:

»Neyðugt er, at vend kemur í gongdina. Uttan yvirskot á rakstrarpostum landskassans verður sum frálíður trupult at rinda rentur av vaksandi skuld. Uppaftur verri verður at finna pening til íløgur.«

### Gjara út undan vali

Yvirlitið hjá landsbankanum yvir útreiðslurnar avdúkar, at vøksturin í lønunum er størsta einstaka orsøkin til, at útreiðslurnar eru vaksnar so nógv. Í 2000 vóru lønirnar tilsamans 1306 milliónir krónur. Í 2010 rindar landkassin 2250 milliónir krónur í lønum ella tilsamans 944 milliónir krónur meiri enn í 2000. Veitingar til einstaklingar, fyritøkur og onnur eru vaksnar 669 milliónir krónur í 10 ár.

Landsbankin sigur seg síggja ein greiðan samanhang ímillum, nær løgtingsval verða hildin, og nær útreiðslurnar økjast mest. Útreiðslurnar øktust munandi í 2001 og 2002 undan valinum í apríl 2002, og á fíggjarlógini fyri 2007, sum var tann seinasta undan valinum í januar 2008, øktust útreiðslurnar aftur munandi. Og síðan staðfestir landsbankin:

»Metstóri útreiðsluvøksturin í 2008 má í hesum høpi sigast at vera eitt løgið fyribrigdi, tí her var talan um fyrstu fíggjarlógina hjá nýggjari samgongu. Vanliga royna nýggjar stjórnir at tátta í tíðliga í valskeiðnum fyri síðan at slaka upp undir val. Uppaftur verri er at skilja stóra útreiðsluvøksturin, tá ið havt verður í huga, at fíggjarlógin fyri 2008 ikki varð samtykt, fyrr enn árið var hálvliðið.«

Og landsbankin heldur fram at undrast á atferðina hjá politisku skipanini, ikki minst í sambandi við harða orðaskiftið um blokkniðurskurðin á 366 milliónir krónur.

»Torført er at skilja útreiðslugongdina, tá ið havt verður í huga, at mangir politikarar hava víst á, at skerjingin av blokkstuðlinum var ein hóttan ímóti landskassarakstrinum. Logisk fylgja eftir blokkniðurskurðin skuldi tískil verið, at royndir vórðu gjørdar í sambandi við fíggjarlóg at laga inntøkur og útreiðslur landskassans til nýggja veruleikan við skerdari veiting. Ilt er at fáa eyga á tiltøk, sum hava munað,« skrivar hann.

### Falskur veruleiki

Í frágreiðingini viðger Landsbanki Føroya eisini, hvussu tað kundi henda, at útreiðslurnar serliga í 2006, 2007 og 2008 vuksu so nógv. Hann útihýsir ikki, at politikararnir av fleiri ymsum orsøkum kunnu vera farnir púra skeivir av veruleikanum:

»Orsøk til útreiðsluvøksturin í seinnu hálvu av tíðarskeiðnum 2000-2009 kann hava verið stóru ein-skiljingarinntøkurnar árini 2006 og 2007. Kann eisini vera, at stóri vøksturin í skatta- og avgjaldsinntøkum landskassans, sum stavaði frá stóra útlánsvøkstrinum hjá peningastovnunum, gav politisku skipanini eina falska mynd av, hvønn veg úrslitið av grundrakstri landskassans gekk,« stendur í frágreiðingini.

uniarge@gmail.com

**FAKTA:**

Avlopið ár 2000 var 767 milliónir krónur

Hallið í 2010 verður 581 milliónir krónur

Grundraksturin er versnaður frá 2000 til 2010 við 1.350 milliónum krónum.

Av hesum telur blokkniðurskurðurin "einans" 366 milliónir krónur.

Lønarútreiðslur hjá landinum í ár 2000 vóru 1.350 milliónir krónur

Í 2010 rindar landskassin 2.250 milliónir krónur í lønum.